VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY







www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 04 - 2013

# Føroyskt og grønlendskt vinnulív hittast í Nuuk

Í dag og í morgin hittast í Norðurlandahúsinum, Katuaq i Nuuk 120 umboð fyri grønlendskt og føroyskt vinnulív og myndugleikar á eini ráðstevnu, sum hevur til endamál at styrkja samstarvið millum londini. Ráðstevnan byrjaði seinnapartin, og millum luttakararnar eru m.a. Kaj Leo Johannesen, løgmaður og grønlendski ráðharrin fyri vinnu og ráevni, Jens-Erik Kirkegaard. Vinnuáðstevnan er komin í lag gjøgnum eitt samstarv millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og grønlendska arbeiðsgevarafelagið. Grønlendska kringvarpið KNI hevði seinnapartin samrøðu við stjóran í Artic Base Supply, Jens Panum Have, sum letur vørur og tænastur til oljufeløgini, ið arbeiða í Grønlandi. Hann vónar, at tey kunnu fáa gleði av einum tættari samstarvi við Føroyar. Eg trúgvi ikki, at tað fara at vísa seg uppgávur júst nú á hesi ráðstevnuni, men tað er heldur ikki tað mest umráðandi. Tað, sum hevur týdning fyri okkum, er at menna samskiftið og sambandið til samstarvsfelagar í eitt nú Føroyum, soleiðis at tað einaferð í framtíðini kann byggja brýr til nýggjar uppgávur og samstarvspartnarar. Formaðurin fyri Grønlands Arbejdsgiverforening, Brian Buus Pedersen, vónar, at okkurt ítøkiligt fer at spyrjast burtur úr, nú so mong eru við til ráðstevnuna. Eg vóni, at so nógvar grønlendskar fyritøkur sum til ber fáa samband við føroyskar fyritøkur og kunnu tosa um framtíðar samarbeiðsmøguleikar. Tað er tað, sum hevur okkara áhuga. KNR skrivar á síni heimasíðu, at luttakararnir úr báðum londunum fara at kunna hvør annan um royndirnar á olju- og námsøkinum á ráðstevnuni. Fjølbroytt og áhugaverd skrá Føroyska ferðalagið við løgmanni á odda fór til Grønlands mánamorgunin. Við á ferðini eru 48 fólk umboðandi 34 fyritøkur og stovnar umframt løgmansskrivstovuna og Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið skipar fyri ferðini. Mánadagin varð millumlent í Egilstøðum, har føroyingarnir vitjaðu á Alcoa verksmiðjuni. Seinnapartin varð

farið víðari til Reykjavíkar, har vitjað varð hjá Vørði/BankNordic, áðrenn kósin kósin varð sett móti Nuuk. Fyrrapartin í dag hava føroyingar búsitandi í Grønlandi havt høvi at greiða frá teirra vinnulívsroyndum. Tiltakið var í hølunum hjá BankNordic í Nuuk. Seinnapartin varð vinnuráðstevnan so sett í býnum. Har hava føroyingar so í dag havt høvi at greiða frá sínum royndum við m.ø. oljuleitingarvirksemi. Grønlendingar hava í sínum lagi greitt frá útlitum og avbjóðingum innan námsvinnu og olju - og gassleiting í Grønlandi. Vinnuráðstevnan heldur áfram mikudagin, har ið aðrar vinnugreinar eisini verða viðgjørdar, eitt nú fiski- og flutningsvinnan. Týskvøldið er løgmaður vertur við ein døgurða fyri innbodnum. Mikudagin seinnapart verða styttri fundir millum føroyskar og grønlendskar fyritøkur. Íalt eru umleið 120 fundir avtalaðir frammanundan, og væntandi fer at leggjast afturat komandi dagarnar. Tað er Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum skipar fyri vinnuferðini. Ráðgevingar- fyritøkan Syntesa hevur fingið fundirnar í lag, og Syntesa hevur eisini samskipað ferðina og skránna fyri vinnuráðstevnuna í samstarvi við føroyska og grønlendska arbeiðsgevarafelagið. Grønlandsferðin endar við virkisvitjanum hósdagin, og ferðalagið kemur heimaftur fríggjadagin skrivar Vinnuhúsið á síni heimasíðu. Niðanfyri partur av skranni a vinnuraðstevnuni: Velkommen Lagmand Kaj Leo Holm Johannesen og Repræsentant for Naalakkersuisut (TBC) byder velkommen. Præsentation af grønlandske mine, olie- og gasaktiviteter: Råstofs aktivitet i Grønland, TBC Eksempler på konkrete storskala projekter, TBC Hvad ser Grønlands Arbejdsgiverforening (GA) som væsentligt ift., hvordan færøske virksomheder involverer sig i Grønland, Brian Buus Pedersen, Grønlands Arbejdsgiverforening Færøske erfaringer med olie- og gasaktiviteter Kompetenceløft og erhvervsudvikling som følge af olie- og gas efterforskning set fra Færøernes Arbejdsgiverforening (FAG), Marita Rasmussen, direktør i Færøernes Arbejdsgiverforening. Fra ingen til +1000 arbejdspladser i offshore oil & gas på 15 år, Magni Arge formand i Faroe Oil Industry Associations og CEO for Atlantic Airways. Færøske erfaringer med lovgivning og initiativer i forhold til at tiltrække udenlandske investeringer på Færøerne. TBC KORT OG KONTANT Forventede gevinster på kort og mellem lang sigt ifølge 3 færøske og 3 grønlandske erhvervsledere: Martin Ben Shalmi, Xploration Services Greenland & Greenland Petroleum Trine Jensen, Shell Grønland Jón Danielsen, Articon Gunnbjørn Joensen, THOR TBC Jóhanna á Bergi, Faroe Ship TBC Repræsentant for Royal Arctic Line TBC Skra mikudagin: De arktiske udfordringer og forretningsmuligheder Grønlands fiskeri i fremtiden, Henrik Leht, formand for Polar Seafood Maritime services i forbindelse med Nord-Vest passagen, Jens P. Have, direktør i Arctic Base Supply Potentielle minerale forekomster i Grønland, Henrik Fenger Jeppesen, Asiaq Greenland Survey Introduktion til det grønlandske erhvervsliv Selskabslov og registrering, Peter Schriver, Nuna Advokater & Claus Bech, Deloitte Generelt behov for samarbejde, Ole Riger-Kusk, Rambøll Grønland Introduktion til den færøske erhvervsdelegation Præsentationer fra færøske virksomheder: BankNordik, SNA, Port of Runavík, PB-Consult, Articon, Rókin, Glyggur, MEST, PAM, Faroe Ship, Atlantic Airways og Syntesa Face-to-Face møder i Katuaq